**UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ**
Ministry of Environment

Tvøroyrar Kommuna
Postbox 80Tvørávegur 37
310 Tvøroyri

Tórshavn, tann 21. oktober 2024
J. nr.: 24/18330-4
Viðgjørt: KHP
Tygara skriv:

*Góðkenningarskriv*

**Broyting í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu – matr. nr. 16**
Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Tvøroyrar kommuna í telduposti dagfestum 6. august 2024 sent Umhvørvismálaráðnum uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu til góðkenningar.

Uppskotið snýr seg um at broyta matr. nr. 16 á Tvøroyri frá F: *Fríðarøki* til A: *Miðstaðarøki*. Talan er um gamla fótbóltsvøllin á Sevmýri á Tvøroyri og gamla TB-húsið.

Broytingin hevur ligið frammi frá 17. apríl til 8. mai 2024. Tá ið freistin at koma við møguligum mótmælum ella broytingaruppskotum var farin, 31. mai 2024, hevði kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot fingið.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og í skrivi dagfestum 11. september 2024 viðmælir býarskipanarnevndin broytingina í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu sum omanfyrinevnt.

Nevndin hevði viðmerkingar um, *at tað ikki er nágreinað í almennu byggisamtyktini fyri A: Miðstaðarøki, hvussu stór grundstykkini skulu vera í øki A.*

Sagt verður frá, at Umhvørvismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir broytingina í byggisamtyktini í byggisamtyktini fyri matr. nr. 16 á Tvøroyri, soleiðis sum kommunan hevur søkt um. Víst verður til viðmerkingina frá Býarskipanarnevndini.

Sambært § 7, stk. 1, í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir skal kommunan kunngera byggisamtyktina, beinanvegin hon er góðkend. Byggisamtyktin fær gildi, tá ið hon er kunngjørd.

Sambært § 3, stk. 1, í kunngerð nr. 122/2023 um lendisskrá skal kommunan senda Umhvørvisstovuni broyttu byggisamtyktina í seinasta lagi fýra vikur eftir, at hon er góðkend av Umhvørvismálaráðnum.

Mint verður á, at hóast Umhvørvismálaráðið nú hevur góðkent broytingina í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu eftir reglunum í býarskipanarlógini, sleppur kommunan ikki undan at fáa til vegar møguligar aðrar góðkenningar, sum krevjast frá øðrum myndugleikum. Víst verður til kunngerð nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð.

Hjálagt hesum góðkenningarskrivi eru rættað kortskjal við átekning frá Umhvørvismálaráðnum.

Vegna Umhvørvismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri